# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 19.12.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 122/24 | 24/01283-2 | Marknaumskipan millum matr.nr. 1211a og almennan veg |
| 123/24 | 24/01284-1 | Marknaumskipan millum matr.nr. 712a og 757a v.fl. |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 124/24 | 23/00248-22 | Leiguøki |
| 125/24 | 24/01082-1 | Keyp av lendi |
| 126/24 | 24/01347-1 | Skuldarumskipan |

**Til viðgerðar**

## 122/24
## 24/01283-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 1211a og almennan veg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 09.12.2024 | 120/24 |
| 2 Tekniska Nevnd | 11.12.2024 | 73/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.12.2024 | 102/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 19.12.2024 | 122/24 |

**24/01283-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 1211a og almennan veg**

**Frágreiðing um málið:**

1. Eigarin av matr.nr. 1211a hevur kunnað umsitinga um, at hann í 1981 gjørdi avtalu við kommununa um at lata lendi til Garðavegin, afturfyri at kommunan stoypti garð eftir nýggja markinum millum matr.nr. 1211a og vegin.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Hóast garðurin er stoyptur fyri langari tíð síðani, er umskipan av lendinum ongantíð formaliserað. Talan er um uml. 30 $m^2$ frá matr.nr.- 1211a til "litra u"

2. Í øðrum lagi vísir eigarin av matr.nr. 1211a, at hann er sinnaður av lata kommununi trýkantin niðri við Jørundsgøtu, afturfyri at kommunan stoypir marknagarð millum matr.nr. 1211a og matr.nr. 1211b. - Við yvirtøku av nevnda trýkanti (uml. 5 $m^2$), fær matr.nr. 1211b beinleiðis atgongd til Jørundsgøtu, sum ynski áður hevur verið um.
   Mett verður, at garðurin kostar uml. kr. 25.000,-




upplegg til broyttan matrikul

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðadyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Vegir íløga – kr. 25.000,-

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at viðurskiftini uppi við Garðavegin verða formaliserað beinanvegin, og at tikið verður undir við uppskotinum frá eigaranum av matr.nr. 1211a um kommunala yvirtøku av tríkantinum niðri við Jørundsgøtu afturfyri gerð av uml. 5,5 metra langum garði framvið markinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 9. desember 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 29-11-2024.

**Tekniska Nevnd 11. desember 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 09-12-2024.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2024:**
Nevndin tekur undir við TN 11-12-2024.

**Klaksvíkar Býráð 19. desember 2024:**
Tilmælið frá FíN 17-12-2024, einmælt samtykt.

## 123/24
## 24/01284-1 Marknaumskipan millum matr.nr. 712a og 757a v.fl.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 09.12.2024 | 121/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 10.12.2024 | 63/24 |
| 3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 10.12.2024 | 66/24 |
| 4 Tekniska Nevnd | 11.12.2024 | 74/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.12.2024 | 103/24 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 19.12.2024 | 123/24 |

**24/01284-1 Marknaumskipan millum matr.nr. 712a og 757a v.fl.**

**Frágreiðing um málið:**
Gongugøtan norðanfyri rennibreytina á Másheyggi liggur partvís inni á matr.nr. 757a, sum er ogn hjá KFUM. Samstundis liggur spæliøkið hjá Drotning Margrethu barnagarði (matr.nr. 757b) partvís inni á kommunalu ognunum, matr.nr. 712a og litra g.

Í sambandi við ætlan kommununnar um at stoypa marknagarð millum Jógvan Waagsteinsgøtu og barnagarðsøkið (KFUM), verður lagt upp til, at gongugøtan inni á matr.nr. 757a verður matrikulerað uppí ítróttarøkið - matr.nr. 712a - , meðan partur av matr.nr. 712a og litra g verður fluttur til matr.nr. 757b. Tó eigur endaliga markið og harvið staðsetingin av marknagarðinum millum J. Waagsteinsgøtu og barnagarðsøkið at verða kannað nærri – hetta eisini við atliti til vega- og parkeringstørv framvið aktuella vegastrekkinum. Sí viðfest notat við tekning.

Sambært fyriliggjandi uppskoti letur kommunan uml. 210 m$^2$ til ognina hjá KFUM, samstundis sum KFUM letur á leið somu vídd til kommununa.



Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Uml. kr. 200.000,- til stoypan av garði v.m. fíggjast av rakstrarstaðnum "Barnaansing felags".

**Tilmæli:**
Biðið verður um heimild til at virka fyri makaskifti sambært omanfyristandandi.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 9. desember 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 29-11-2024.

**Mentanarnevndin 10. desember 2024:**
Nevndin tekur um við UBN, dagf. 09-12-2024.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 10. desember 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 10.12.2024.

**Tekniska Nevnd 11. desember 2024:**
Nevndin tekur undir við B&U 10-12-2024.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2024:**
Nevndin tekur undir við TN 11-12-2024.

**Klaksvíkar Býráð 19. desember 2024:**
Tilmælið frá FíN 17-12-2024, einmælt samtykt.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 124/24
## 23/00248-22 Leiguøki

## 125/24
## 24/01082-1 Keyp lendi

## 126/24
## 24/01347-1 Skuldarumskipan

*Fundurin lokin kl. 18:20*